

## Vandafull rúmdarferð

Sjey rúmdarmenn eru umborð á amerikonsku rúmdarferjuni Atlantis, sum varð skotin út í ringrás um Jørðina frá støðini Cape Canaveral í Florida seinnapartin í gjár. Rúmdarumsitingin NASA sigur, at talan er um eina vandafulla ferð. Høvuðsuppgávan hjá manningini er at umvæla tann stóra Hubble-kikaran, sum hevur verið í ringrás um Jørðina síðani apríl í 1990, og sum hevur ferðast meiri enn 100.000 ferðir runt um Jørðina hesi árini. Nú skal kikarin umvælast, og tað fer at krevja, at nakrir av manningini á Atlantic skulu arbeiða uttan fyri ferjuna fimm ferðir, sigur NASA.

# Frítíðarskúlin við Løgmannabreyt best í fótbólti

**Í góðveðrinum í gjár skipaði Frítíðarskúlin við Løgmannabreyt fyri fótbóltskapping millum frítíðarskúlar í Havn. Tá kom samanum gjørdist avbjóðarin sjálvur vinnari**

BØRN OG HEILSA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í alt vóru 8 lið við í fótbóltskappingini. Frítíðarskúlin í Hoyvík hevði 2 lið, frítíðarskúlin við Løgmannabreyt hevði 2 lið, og frítíðarskúlarnir í Miðstovninum, Hornabø, Dr. Ingridar barnagarði og Badmintonhøllini høvdu 1 lið hvør.

Á vøllinum vóru 6 leikarar á hvørjum liðið, harav ein málverji.

Kappingin var skipað í 2 bólkum við 4 liðum í hvørjum, og hvør dystur í bólkaspælinum var tvær ferðirnar fimm minuttir. Til dystirnar vóru tveir smáir graslíkisvøllir í økinum rundan um frítíðarskúlan í Løgmannabreyt brúktir til endamálið. Í alt vóru uml. 70 til 80 børn við í kappingini.

Báðar semifinalurnar vóru millum liðini hjá frítíðarskúlanum í Hoyvík og frítíðarskúlanum við Løgmannabreyt, og frítíðarskúlin við Løgmannabreyt vann báðar dystirnar, og stóð sostatt við báðum liðunum í finaluni. Tískil var steypið, sum kappast var um, verandi í frítíðarskúlanum við Løgmannabreyt.

Sagt verður at dystirnir vóru sera javnir, og at frítíðarskúlin við Løgmannabreyt vann við einum máli í báðum semifinalunum.

Áðrenn semifinalurnar vóru leiktar fingu børnini millummála, og aftur við fingu tey okkurt gott at sløkkja tann væl tiltrongda tostan við.

Myndirnar hevur Bjarni Beder tikið.













# Fuglafjørður hevur yvirhálað Klaksvík í renning

**Treysti í Klaksvík hevur í fleiri ár verið virkið í Klaksvík við hópin av rennarum. Tá ið heilsu-faldari kom út í Klaksvík, øktist rennaratalið munandi frá 40 hvønn leygardag og upp móti 300.**

RØRSLA

Nú hevur ein bólkur í Fuglafirði tikið seg saman at skipa fyri leygardagsrenning við fyrimynd úr Klaksvík. Tí heittu tey á Treysti um at hjálpa til og annars leggja lag á

Áðrenn renningin varð sett í gongd helt Hans Pauli Strøm Landsstýrismaður røðu u m hví tað er so skilagott at røra seg

Ein kempusuccés, verður sagt úr Fuglafirði. Hóast vánaligt veður við nógvum regni, vóru ikki færri enn 150 fólk, sum fingu startnummar uppá seg.

Har vóru fólk í øllum aldri, nógvar smábarnafamiljur, harav fleiri við børnum í barnavognum og koyristólum.

Har vóru ung, vaksin og eisini nógv í tí heilt tilkomna endanum, fleiri í pensjónsaldrinum.

Har vóru fólk við ymiskum førleika fyri at renna ella ganga. Onkrir vandir rennarar, tey flestu tó ikki von við at renna. Og har vóru fleiri, sum ongantíð áður høvdu roynt at runnið fyrr - og als ikki so langan tein.

Hetta var sanniliga ein heilsurenning sum er beinleiðis eftir uppskriftini.

Rutan varð løgd í tveimum, ein stutt leið – ca 2,5 km, og ein longri uppá ca. 5 km.

Hetta er fyrstu ferð nakrantíð, at slík heilsurenning hevur verið í Fuglafirði, søgdu tey – og tað má man siga var ein flott byrjan.

Ja, Gutti, Jonhard og Pól frá Treysti, sum vóru við til at leggja lag á, vóru heilt ovfarnir. Tí nú vóru teir í nøgd av fólki í lutfalli yvirhálaðir í Fuglafirði í mun til í Klaksvík.

Klaksvík er jú Heilsubýurin burturav, við hópin av rennarum, men við so mongum øðrum eisini, har vit ikki mugu gloym svimjihøllina, gongufelagið og øll hini.


*Mynd: Dávur Winther*

Tó er hetta ein gleðilig yvirháling, legði Gutti afturat við einum smíli.

Í Fuglafirði eru tað serliga Regin Jóanesarson, John Allan Midjord og Suffía við Stein, sum hava verið stigtakarar til væleydnaða rennitiltakið, sum ætlandi skal handa fram hvønn leygardag.

Ætlanin er at hava ókeypus innandura venjingar í Høllini á Kambsdali komandi tveir týsdagarnar kl 17.30

### Kveikjandi fundur

Hósdagin 7. mai kl. 19.30 var kveikjandi pallborðsfundur í Mentanarhúsinum, har evnið er rørðsla og heilsa.

**Luttakararnir vóru m.a:**
- Diabetesfelagið
- Hjartafelgið
- Heðin Thomsen, hjartalækni
- Ingunn Gardbo, sjúkrasysturin, sum var við í sending í sjónvarpinum. Hon klænkaði seg sera nógv við at leggja kostin um og røra seg.
- Regin Jóanesarson, fortaldi um hvussu hann kom úr sálarligum trupulleikum við at renna.
- Ítróttarfeløgini í Fuglafirði – møguleikar fyri rørslu
- Tórmóður Stórá, sálarfrøðingur um rørslu og ávirkan á sálarligar sjúkur
- Dávur Winther um rørslu og býarskipan